# Eivør skal syngja í Tivoli




**Um góðar tveir mánaðir verður konsertsalurin í Tivoli karmur um eina ta størstu konsertina nakrantíð, har ein føroyingur er høvuðspersónur, tá Eivør Pálsdóttir fer á pallin at syngja fyri eini 1.700 áhoyrarum**

EIVØR Í TIVOLI
*Rókur Jákupsson Jakobsen (rokur@sosialurin.fo)*

Konsertin verður leygarkvøldið 9. september kl 20. Tá fer Eivør á pallin saman við nøkrum av matastu tónleikarunum í kongaríkinum, og talan verður um tónleik á høgum stigi, tí talan er veruliga um teir bestu tónleikararnar, sum Eivør hevur savnað sær til hetta kvøldið. Tað er blaðið »Kvinna«, sum skipar fyri konsertini.

Tónleikararnir verða bæði danir og føroyingar:

Troels Skovgaard á gittara. Hann hevur spælt saman við Hanne Boel og Cæcilie Norby. Klaus Menzer leikar trummur. Hansara tónlistarliga karriera byrjaði í bólkinum Sneakers, har navnframka Sanne Salemonsen var sangari.

Okkara Edvard Nyholm Debess fer at leika bass. Hann hevur í nógv ár verið virkin innan jassin í Føroyum og í Norðurlondum annars, men hevur seinastu árini eisini verið nógv at hoyra í bólkinum »Headache Blues Treo«. Magnus Johannesen er kanska fyrst og fremst kenur úr superbólkinum »Plúmm«. Magnus hevur síðani spælt við einum ótali av bólkum so sum »Terji & Føstufressar«, »Frændir« og »Taxi«.

Umframt hesar framúr góðu tónleikarar er ein strúkikvartett við fyri at víðka um ljóðmyndina. Eivør hevur eisini tríggjar kórsangarar afturat sær, og tær eru Cristine Birksøe, Stine Findsen og tann føroyska songkvinnan Unn Patursson. Sviin Pelle Giöbel tekur sær av ljóðinum. Hann hevur drúgvar royndir innan ljóðviðgerð og verður roknaður sum ein hin besti til at gera "live" ljóð.

### Tónlistarlig ævintýr

Lívið og tónleikurin hjá Eivør kann lættliga samanberast við eitt ævintýr. Hennara ævintýr byrjaði longu, tá ið hon sum 13 ára gomul vann Ársins Songrødd-kappingina. Longu tá varð hon skírd tað størsta talentið nakrantíð í Føroyum. Eivør mentist støðugt, og flutti av landinum fyri at liva sum tónleikari burturav. Áðrenn nakar vardi, var Eivør Pálsdóttir vorðin ein stór stjørna í grannalandinum Íslandi. Eivør hevur framført sín tónleik í nógvum ymiskum londum, og allastaðni verður hon móttikin við opnum ørmum. Ummælarar í hópatali rósa henni, hvar hon so er. Og enn er hon blaðung...

Nú skal songkvinnan úr Gøtu so trína á pallin í konsertsalinum í Tivoli. Hesin salurin hevur hýst fleiri av heimsins størstu stjørnum, og nú eigur Eivør tørn. Konsertsalurin í Tivoli er tiltikin. Onga aðrastaðni finnur tú so fullfíggjaðar umstøður til eina heildaruppliving sum í konsertsalinum. Salurin varð umvældur fyri kortum og hevur nú ein heilt einastandandi akustikk. Salurin tekur um 1.700 fólk, so hetta er í veruleikanum ein hin størsta konsertin, ið nakar føroyingur hevur havt nakrantíð. Á konsertini sleppur áhoyrarin at hoyra eitt bland av tí besta tilfarinum hjá Eivør.

# Eivør: »Hatta er ein dreyn

**Í samband við framførsluna í konsertsalinum í Tivoli komandi september, fekk Sosialurin eitt prát við Eivør Pálsdóttir í morgun. Tað var eyðsæð, at hon metir hetta verða heilt stórsligið. Hon vísti á, at hon gleðir seg til at skriva sítt navn í longu og navnframu søguna á hesum heimskenda konsertsali**

EIVØR Í TIVOLI
*Rókur Jákupsson Jakobsen (rokur@sosialurin.fo)*

"Hetta verður heilt stórt. Eg havi verið inni í salinum, og har eru ótrúliga góðar umstøður. Akustikkurin er frálíkur, og tað vakra umhvørvi ger tað heila enn størri", sigur hon. "Fleiri av teimum heilt stóru tónleikanøvnunum hava spælt har, og so er tað so stuttligt at hugsa sær, at um nakrar mánaðir, skal eg framføra har". Unga gentan sum sleit sínar barnaskógvar í Gøtu, hevur førkað seg út í verðina. Eivør er av álvara við at gerast kend í útheiminum, og er hetta nakað sum føroyingar eru ernir av. Unga Eivør hevur spælt nógvar konsertir í losjuni í Gøtu, so hetta má kennast sum eitt risalop.

### Ein stór verkætlan

Salurin er stórur. Hann tekur út við 1700 fólk, so tað er ongin ivi um, at hetta er ein av teimum størru konsertunum fyri Eivør. "Hetta er eitt stórt tiltak. Tað heila er ordiliga professionelt", sigur hon. "Hóast tað eru fleiri mánaðir til konsertin verður, so eru allar fyrireikingar longu komnar uppá pláss. Vit hava enntá longu avgjørt hvørji løg vit fara at spæla, tí at her eru so nógv fólk sum eru við í verkætlanini".

"Har verða nógvir tónleikarar, so har er nógv ið skal venjast og tilrættisleggjast. Hóast eg havi spælt saman við tónleikarunum áður, so verður hetta nakað heilt serligt". Eivør hevur spælt saman við hesum tónleikarum á teimum báðum "Tríggjar Havfrýr"- konsertunum, sum hava verið í Føroyum og í Danmark. "Hesaferð verður tað bara mítt tilfar, sum vit framføra, og tí eri eyka spent uppá konsertina", sigur hon.

Tá ið Eivør fer á pallin, hevur hon bæði føroyskar og danskar tónleikarar afturat sær. "Í løtuni situr ein dani og útsetir nøkur av mínum løgum til eina strúkikvartett. Eg gleði meg til at hoyra tað úrslitið. Annars er tað eisini eitt sindur serligt, at eg havi tvær danskar kórsangarar við mær. Tær duga ikki so væl at syngja føroyskt, so tað verður mest til Uhh og Ahh", sigur Eivør grínandi. "Afturat teimum báðum donsku kórsangarum hevur Eivør fingið Unn Patursson at syngja við. "So kann hon hjálpa við tí føroyska", leggur hon skemtandi afturat.

### Tað gongur rætta vegin

Tað sær út til, at danir taka Eivør og hennara tónleik til sín. Fyri ári síðan gav hon út fløgu saman Danmark Radio Big Band. Hetta big band er kent víða um, og tískil er tað at kallað eitt privilegium at sleppa at framføra við tí bólkinum. Fløgan sum tey góðu út saman, hevur verið væl móttikin, og tær eftirfylgjandi konsertirnar hava verið væl vitjaðar. Men er Eivør um at gerast kend í Danmark?

"Eg vil ikki siga at eg eri kend. Her stendur onki blaðfólk uttanfyri mína hurð", sigur hon skemtandi. "Men eg merki, at tað koma fleiri og fleiri fólk á mínar konsertir. Tá eg spæli, er tað sum oftast útselt, so eg haldi at tað gongur rætta vegin".

"Men tað er ikki so, at nógv fólk steðga mær á gøtuni. Eg haldi heldur ikki, at eg eri eitt tílíkt listafólk. Tey sum hava áhuga fyri mær og mínum tónleiki, koma á konsertirnar og fara heim aftaná. So tað er ikki tað stóra við at skriva autografar. Men allíkavæl haldi eg, at nógv fólk vita hvør eg eri", sigur hon. "Men tað heila er mestsum stille og roligt", vísur hon á.

### Nógvar spennandi framførslur

Eivør skal framføra rættiliga nógv í summar. Longu fríggjadagin skal hon á pall á Roskilde Festivalinum. "Eg skal framføra á einum lítlum palli, sum fyrst og fremst er ætlaður sokallaðum singer/songwriter tónleik".

Hóast hon hevur nógvar framførslur fyri framman, so sigur Eivør, at hon heldur hetta vera eitt rættiliga